

www.oljan.fo

**Jan Müller** 09 - 06 - 2012

# Argentina í rættin við bretskum oljufeløgum

Argentinska stjórnin vil nú vera við, at bretska oljuleitingin við Falklandsoyggjarnar er ólóglig, og tí ætlar stjórnin at reisa ákæru ímóti teimum fimm oljufeløgunum, sum eru virkin við oyggjarnar, sum argentinar og bretar hava stríðst um leingi. Vónin um at finna olju við Falklandsoyggjarnar hevur økt spenningin millum Buenos Aires og London, nú 30 ár eftir at Falklandskríggið brast á. Argentinski forsetin, Cristina Fernandez de Kirchner, sigur í almennari yvirlýsing, at bretska oljuleitingin við Falklandsoyggjarnar er ólóglig, og at nógv virksemi har verður framt í loyndum. Uttanríkisráðið í Buenos Aires segði nú um dagarnar, at yvirlýsingin hjá forsetanum ruddar slóð fyri, at stjórnin kann reisa rættarmál ímóti feløgunum, sum eru upp í oljuleitingini við Las Islas Malvinas, sum argentinar rópa Falklandsoyggjarnar.